# Tiltøk

**Gudstænastur 7. apríl**
**Hoyvíkar kirkja:** kl. 19: Ovin Klein Olsen sigur frá nýggju fløgu síni "Aftur til lívið"
**Norðskála:** kl. 19.30 kvøldgudstænasta (konfirmantar luttaka) Emil Olsen.

**MATINÉ**
verður í Havnar kirkju leygardagin kl. 11.30. Kenneth Jones, trompet og Birgitte Schnakenburg, klaver spæla trompetkonsert av Haydn og Arutjunjan.

**Miðvika í Hoyvíkar kirkju**
Mikukvøldið kl. 19 verður aftur Miðvika í Hoyvíkar kirkju, við Ovin Klein Olsen, sum er føroyingur búsitandi í Danmark. Ovin Kl. O. vaknaði ein morgun í 2006 og varnaðist, at hann hevði mist meginpartin av sjónini. Einki var at gera, og hetta var eitt so ógvusligt bakkast, at hann kom í eina sanna lívskreppu. Hvussu hann síðani vann á hesi kreppu og fótaði sær aftur, fer Ovin at greiða frá á Miðvikuni 7. apríl kl. 19. Tiltakið er í kirkjukjallaranum, og øll eru vælkomin.

**Tórshavnar Hvítusunnu-samkoman yviri við Strond**
Sunnudagin kl. 18 Evangelisk møti. Øll eru vælkomin.

**KFUM og KFUK í Havn**
Mikukvøldið kl. 19 í KFUM: Ten-sing kórið venur.
Kl. 19.30 í KFUK: Konfirmantaveitsla, holdini hjá Bergur Debes Joensen og Hera Joensen.
Hósøvldið kl. 19.30 í KFUK: Konfirmantaveitsla, holdini hjá Ann Dahl Hansen og Sverra Steinhólm.
Mánadagur 12. apríl kl. 15 í KFUK: Seinnapartsamkoman við Niels Paula Danielsen presti. Evni: 2. Jóhannesarbræv.
Týsdagin 13. apríl kl. 17 í KFUK: Várgleði fyri børn og juniorar.

**Ebenezer**
Mikudag kl. 20 Bønar- og lærumøti.
Hósdag kl. 12.30 Andakt. Kl. 20 Ungdómsmøti. Hanna Andreasen tosar um kenslur og tunglyndi.
Sunnudag kl. 11 Minnismáltíð Harrans. Barnaansing er meðan møti er. Kl. 12 Eingin sunnudagsskúli. Kl. 18 Evangelisktmøti. Barnaansing er meðan møti er.
www.ebenezer.fo

**Filadelfia Tórshavn**
Mikudagin 7. apríl kl. 16.30 Bøn fyri Ísrael og býnum. Kl. 18 Delli. Kl. 20 Chill
Leygardagin 10. apríl kl. 21 Flare, Fríðtór Debes talar
Sunnudagin 11. apríl Kl. 11 Morgunmøti, Tummas Jacobsen talar.
www.filadelfia.fo

**Listafelag Føroya**
Leygardagin 10. apríl stílar felagið fyri limaútferð til kirkjurnar í Vágunum. Heini F. Petersen, David Johannesen og I.P. Gregoriussen greiða frá. Fráferð kl. 10 frá Listasavninum, kostnaður 300 kr. Tekning í seinasta lagi mikudagin tann 6. apríl kl. 16 við t-posti til malanm@setur.fo ella hjá kassameistara felagsins tlf. 311744 við upplýsingum um navn, telefon og t-post.

**Argir, Kirkju- og missiónshúsið**
Hóskvøldið kl. 20 Bíbliutími v/ Tom Skaale evni: Matt 13, 1-23
Sunnukvøldið kl. 18 Møti v/ Hjørleif Poulsen, Klaksvík

**Samkoman Immanuel, Brekkutún 5, Hoyvík**
Mikukvøldið kl. 20 Møti. Verið hjartaliga vælkomin
www.immanuel.fo

**Lívsins Orð**
Mikukvøldið kl. 19.30 Tilbiðjan og bøn.
Kl. 20.30 Ungdómsmøti.
Sunnudagin kl. 10.30 Møti v/Pola Jacobsen

**Missiónshúsinum við Landavegin**
Sunnukvøldið kl. 18 hava ungir strandingar møti.

**Frelsunarherurin Tórshavn**
***Tórsgøta 19***
Mikudagin Kl. 15 Bønarmøti
Hóskvøldið kl. 20 Heimaforbundi. Kl. 20 Ungdómurin í skótasalinum.

Sunnudagin kl. 11 Morgunmøti v/sunnudagsskúla
Kl. 18 Møti v/ sjónvarpsupptøku. Loytnat Jacobina Heinese talar

**Meinigheitshúsinum í Havn**
Mikukvøldið Kl. 20 Felagskóri venur
Hóskvøldið kl. 20 Ungdómsmøti v/Sverri Steinhólm.
Sunnudag kl. 14 Sunnudagsskúli. Kl. 18 Møti v/Heri Tróndheim.
Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Evangeliihúsið, Tróndargøta**
Hóskvøldið kl. 18.30 MiniSalt (fyri børn úr 13 árum), kl. 19.30 Chicks Rule og Laminin (fyri gentur og dreingir úr 13 árum).
Sunnudagin kl. 11 familju- og morgunmøti við sunnudagsskúla, Rigmor & John Fonsdal tala.
Mánakvøldið kl. 20 lovsangs- og bønarløta. www.gospel.fo

**Samkoman Marknagil Fjalsgøta 2, Tórshavn**
Sunnudagin kl. 10.30 Breyðbróting.
Sunnudagsskúli kl. 12
Sunnukvøldið kl. 18 Evangeliskt møti.
Mánakvøldið kl. 20 Bønar/uppbyggingarmøti.
Øll eru hjartaliga vælkomin

**Miðvágs Missiónshús**
Sjómanskvinnuringurin kemur saman mikukvøldið kl. 19.30. Torleif Johannesen verður við. Allar kvinnur eru vælkomnar.

**Sørvágs missiónshús**
Sunnudagin kl. 17: Ovin Klein Olsen sigur frá nýggju fløgu síni "Aftur til lívið"

**Aglow Sandoy**
Møti verður í Samljóð Skopun mánadagin kl. 19. Vitjan av landsleiðsluni. Tosað verður um tær ymisku uppgávurnar í Aglow og um 25 ára stevnuna í mei. Allar kvinnur eru vælkomnar.

**Missiónshúsið í Skopun**
Mikukvøldið kl. 19.30 bønarløta. Kl. 20 bíbliutími. Missiónsvikan verður í døgunum 15.-18. apríl.

**Glæman Kvívík**
Sunnukvøldið kl. 17 møti v/John S. Myllhamar

**Kollafjarðar Missiónshús**
Sjómannskvinnuringurin kemur saman hóskvøldið kl. 20. Allar kvinnur eru vælkomnar.
Leygarkvøldið kl. 19: Ovin Klein Olsen sigur frá nýggju fløgu síni "Aftur til lívið"

**Hvalvíkar missiónshús**
Møtið verður sunnudagin kl. 18. Luttøka úr Leirvík. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Keldan, Skálafirði**
Leygarkvøldið kl. 21 Awake við Dánjal Petersen úr Lívdini.
Sunnudagin kl. 17, Møti við ymiskari luttøku. Barnamøti kl. 17. (Nátturði aftaná møti)

**Bygdalegan fyri Skála og Skálafirði**
verður í Leguhúsinum í Nesvík. Vikuskifti 9-11 apríl. Aðrar familiur sum hava tilknýti til bygdirnar eru vælkomin at vera við. Tekning fer fram hjá Jóhannu á tlf 270293.

**Missiónshúsið á Selatrað**
Sunnudagin kl. 17 verður møti v/John S. Myllhamar

**Siloa, Fuglafirði**
Bøn, bíbliulæra og hugnalig samvera við drekkamunni verður í Siloa mikukvøldið kl. 19.30. Poul Færø talar.
Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Soli deo Gloria**
Hóskvøldið kl. 20 ungdómsmøti v/ Hendrik A Olsen
Sunnukvøldið kl. 18 møti v/ Fimmboga Poulsen og Jógvan Jacobsen.
Tú ert hjartaliga vælkomin.

**KFUM & K í Klaksvík**
Mikukvøldið kl. 20 Bíbliutími við Petur Martin Glerfoss 2.Pætursbræv kap.1

**Frá Eysturoyar Gongufelag**
Sunnudagin ganga vit Elduvík – Funningsfjørður. Greitt verður frá um bygdini Elduvík. Túrurin er lættur umleið 3 tímar. Vit møtast við bátahylin í Funningsfirði kl. 14.



**Góða Marita**
Hjartaliga tillukku við føðingardegnum í morgin.
Ynskja vit tær og jesus pápi fylgi tær.
**Mamma og babba**



**Góði fitti Jónatan**
Hjartaliga tillukku við 1 ára føðingardegnum.
Vit elska teg.
**Ynskja omma og abbi í Nólsoy**



Elna Høgenni og John A. Poulsen HOYVÍK


Eyðbjørg E. Antoniussen og Óli Nolsøe ARGIR


Matilda Sivertsen og Lucas B. Ceni TÓRSHAVN


Siri Johnsdóttir og Martin Mohr í Grund EIÐI/GØTA


Barbara Nielsen og Kim Roest TRONGISVÁGUR

Øll, sum atkvøða fyri vinnaraparinum eru við í lutakastinum um eitt gávukort frá SMS á kr. 1.000,-

sms

vinn eitt ATKVØÐUSEÐIL
brúdleyp

Fyll seðilin út og set ein kross í fýrkantin við tað parið, sum skal vinna eitt brúdleyp fyri uml. **kr. 38.000,-**

Navn innsendarans: Telefon nr.:

Ein atkvøðuseðil verður í Sosialinum hvønn dag til og við týsdagin 11. mai 2010. Ikki er loyvt at margfalda seðilin!
- Klipp beinleiðis úr blaðnum og send til:
**Sosialurin**, att: Brúdleypskapping, Postboks, 110 Tórshavn

Sosialurin

Sosialurin 341800